**Søgu- og samfelagsdeildin bjóðar í heyst út fimm støk bachelorskeið innan søgu, stjórnmálafrøði og løgfrøði.**

## Búskapur og Samfelag

Tey lesandi fáa ment førleikan at skilja búskaparfrøðilig hugtøk og búskaparfrøðiligar tekstir. Fokus er á tøkniligar-búskaparligar umbroytingar sum liður í samfelagsligum umbroytingum, búskaparfrøði sum verkligan búskaparpolitikk, og søguligu gongdina hjá búskaparfrøði sum teoretisk lærugrein.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á bachelorstigi.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir.

Kostnaður kr. 4.000

## Føroysk Nýtíðarsøga

Tey lesandi fáa ígjøgnum skeiðið grundleggjandi kunnleika til politisku søgu Føroya aftaná 1500 og bókmentir um evnið. Hugt verður eftir útvaldum bókmentum, sum snúgva seg um modernaða føroyska søgu, og føroysk søga verður sett inn í eitt størri alevropeiskt høpi.

Stakskeiðið telur 10 ECTS.

Undirvísingin byrjar viku 35 í 2010

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið eru miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir. Skeiðið vendir sær eisini til fólk, sum hava almennan áhuga fyri føroyskari søgu.

Kostnaður kr. 4.000

## Grundskeið í Lóg

Tey lesandi fáa ígjøgnum dømi úr lógum, kunngerðum, dómum og øðrum eina fatan av háttalagnum hjá lógkønum (juristum). Tey lesandi fáa grundleggjandi kunnleika til hvussu lógkøn skipa, finna, tulka, meta saman, smíða og royna lóg. Harafturat fáa tey lesandi innlit í stjórnarlóg, fyrisitingarlóg, altjóðalóg og revsilóg, umframt einstøk onnur evni.

Stakskeiðið telur 15 ECTS á bachelorstigi.

Undirvísingin byrjar í viku 35 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir.

Kostnaður kr. 6.500

**Mentanarfrøði**

Tey lesandi fáa á skeiðnum kunnleika til grundleggjandi antropologisk og etnologisk grundhugtøk og kanningarhættir. Ymisk høvuðsverk og rák verða gjøgnumgingin, og eisini verða aktuel evni úr gerandisdegnum tikin upp til viðgerðar úr antropologiskum/ etnologiskum sjónarhorni.

Stakskeiðið telur 10 ECTS.

Undirvísingin byrjar í viku 35 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið eru miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir.

Kostnaður kr. 4.000

**Samfelagsvísindalig háttaløg**

Tey lesandi fáa innlit í kvantitativar og kvalitativar granskingarhættir, sum verða nýttir í samfelagsfrøði, og ogna sær royndir at brúka hesar í verki. Tey lesandi læra um ymiskar kanningarhættir, læra at gera spurnabløð, savna data inn og viðgera úrslitini í dataforritinum

Stakskeiðið telur 10 ECTS.

Undirvísingin byrjar í viku 36 í 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið eru miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir.

Kostnaður kr. 4.000

---

Gjaldsskeið skulu gjaldast áðrenn skeiðsbyrjan. Lesandi innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn fáa tó skeiðini ókeypis.

Nágreiniligari lýsingar av skeiðunum finnast á www.setur.fo

Umsóknarblað fæst á www.setur.fo ella við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580.

Avmarkað luttøka.

**Umsóknarfreistin er 14. august 2010**. Tikið verður tó upp til skeiðini eru fullsett. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 25. august 2010.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo